# – Tað hevði kanska verið meira sa kraft í at skrivað um Jóannes Patu



22. juni 1906 varð tað søguliga fólkatingsvalið hildið, tá Oliver Effersøe varð valdur á Fólkating. Á øðrum listanum var Jóannes Patursson, kongsbóndi í Kirkjubø, uppstillaður, sum hevði verið fólkatingsmaður síðan 11. juni 1901. Sum løgtings- og fólkatingsmaður hevði hann fingið donsku stjórnina til at seta fram tað sonevnda "tilboðið". Á hinum listanum var Oliver Effersøe, sýslumaður á Tvøroyri, uppstillaður, sum eisini var tingmaður. Hann var hart ímóti "tilboðnum" frá donsku stjórnini. Fólkatingsvalið varð ein stórsigur fyri Oliver Effersøe, sum varð valdur við 1.129 atkvøðum, meðan Jóannes Patursson fekk 489.

Eini 60% av veljarunum tóku lut í fólkatingsvalinum í 1906, og var hetta størsta luttøka sum hevði verið á nøkrum vali í Føroyum.

**Sambandsflokkurin hevur altíð verið tann "skikkiligi" flokkurin. Tað sigur Anja Andreassen, sum hevur skrivað bókina "Sambandsflokkurin 100 ár", ið verður givin út fríggjadagin. Hon heldur, at higartil eru tað mest tey sjálvstýrissinnaðu, ið hava skrivað søguna, og tí hevur hon valt, at bókin mest skal snúgva seg um, hvat sambandsfólk hava sagt og skrivað ta seinastu øldina**

SØGUSKRIVING

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Fríggjadagin verður almenn móttøka í Norðurlandahúsinum í sambandi við, at bókin "Sambandsflokkurin 100 ár" verður løgd fram. Anja Andreassen, sum hevur cand. phil.-prógv í søgu, hevur skrivað bókina. Í síni serritgerð skrivaði hon um søguna hjá Sambandsflokkinum, og hon dylur ikki fyri, at okkurt av tilfarinum í bókini er úr ritgerðini.

Hon leggur tó dent á, at sjálv er hon ikki limur í nøkrum politiskum flokki, og tað ætlar hon sær heldur ikki at verða.

Anja Andreassen greiðir frá, at søgan um Sambandsflokkin er eitt evni, sum ikki er so nógv umrøtt í føroyskari søguskriving, og tí var tað kanska eitt sindur tilvildarligt, at júst hetta varð evnið, tá hon skuldi skriva serritgerð sum søgulesandi.

– Eg og maður mín sótu og prátaðu eitt kvøldið, hvat eg skuldi skriva um, sigur Anja Andreassen, og heldur fram, at av tí at so lítið er skrivað um Sambandsflokkin millum ár og dag, helt hon hetta bæði vera øðrvísi og kanska eisini eitt sindur provokerandi, av tí at hetta var í hægstu "fullveldistíð", sum hon tekur til. Hon tók prógv í 2002.

Bókin um Sambandsflokkin er góðar 400 síður við myndum, og Anja Andreassen hevur umfram at hava arbeitt eitt ár burtur av við bókini, verið í gongd við hesa verkætlan í nøkur tilsamans. Í ritstjórnini hava annars sitið Eilif Samuelsen, Pól á Kletti, Jógvan Ingvard Olsen, Egon Hansen og Lena Nolsøe.



*- Argumentini hjá teimum kunnu ikki brúkast í dag, og tað er tí at samfelagið er so nógv broytt, sigur Anja Andreassen um politisku grundgevingarnar hjá Sambandsflokkinum í m.ø. málspurninginum*

## Ikki samband men fráhald

Spurd, um vit kunnu vænta okkum nakrar nýggjar og kollveltandi síður um Føroya elsta politiska flokk, sigur Anja Andreassen, at tað kunnu vit neyvan.

– Sambandsflokkurin hevur altíð verið tann "skikkiligi" flokkurin, sigur søgufrøðingurin og leggur afturat, at tað ikki er Sambandsflokkurin, sum er komin við teimum stóru og villu hugskotunum.

– Tað hevði kanska verið meira saft og kraft í at skriva um Jóannes Patursson, men eg vóni, at fólk kunnu lesa okkurt nýtt um flokkin, greiðir hon frá.

Í bók síni "Danmark og Føroyar" frá 1927 vil søgufrøðingurin Jørgen-Frantz Jacobsen, sum ikki himpraðist við at viðganga, at hann kendi seg heima á sjálvstýrisveinginum, vera við, at ein av høvuðsorsøkunum til, at split og partapolitikkur kom í tjóðskaparrørsluna ikki so nógv var spurningurin um sjálvstýri, men heldur spurningurin um avhald mótvegis rúsdrekka, og at hetta var brúkt í øðrum politiskum spuriningum.

Í 1903 hevði Jóannes Patursson skrivað bókina "Færøsk politik", og seinni hevði hann tingast við danska løgmálaráðharran, P.A. Alberti, ið umsat føroysk viðurskifti, har úrslitið var tað sonevnda "tilboðið". Hetta snúði seg um yvirtøku av ymsum málsøkjum, og at føroyingar sjálvir skuldu gera av, hvussu ætlaður ríkisstudningur til Føroya skuldi verða brúktur. Málið kom fyri í ólavsøkutingsetuni í 1906, men ein meiriluti valdi at fella uppskotið um "tilboðið" við fylgjandi uppskoti:

"Tinget finder, at en Gennemførelse af den i det høje Ministeriums Skrivelse ommeldte Ordning ikke er gavnlig for Færøerne, og de færøske Vælgere have gennem det i Aar stedfundne Valg til Folketing og Lagting klart tilkendegivet, at de ikke ønsker denne Ordning".

Anja Andreassen heldur, at Jørgen-Frantz Jacobsen kann hava rætt í síni meting í, at brennivínsspurningurin spældi ein ávísan leiklut í flokkabýtinum í 1906.

– Ja, kanska meira enn fólk geva sær far um, sigur søgufrøðingurin, og sipar til, at Jóannes Patursson ikki var ímóti hesum, og hesum gjørdu mótstøðumenn hansara sær dælt av. M.a. kundi ein í Dimmalætting í januar og februar 1906 lesa, at valið í føroyskum politikki var millum "Ædruelighedspartiet" og "Brændevinspartiet".

Tað endaði við, at Føroya Framburðsfelag fór í tvíningar, og sambandsmaðurin Oliver Effersøe varð valdur á Fólkating og vann á Jóannesi Paturssyni. Síðan hava mótstøðumenn Oliver Effersøes ongantíð gloymt honum fyri at hava sagt, at "Vi Færinger føles os fuldstændig som danske og ønske at bevare dansk Sprog paa øerne for vore Efterkommere".

## Skilja ikki argumentini í dag

Spurd, um tað ber til at siga, at argumentini hjá Sambandsflokkinum vóru av meira av mentanarligum slagi ta fyrstu tíðina, og meira av búskaparlsigum slagi í dag, sigur Anja Andreassen, at pengar eisini spældu ein leiklut í grundgevingunum hjá politikarum floksins tey fyrstu árini. Sambandið við Danmark var mett sum ein fyritreyt fyri menning av tí føroyska samfelagnum. Í sambandi við tey mentanarligu argumentini, so hildu sambandsmenn tey fyrstu árini, at tað føroyska málið var ikki nóg sterkt.

– So til ber at siga, at teir brúktu bæði búskaparlig og mentanarlig argument, sigur Anja Andreassen. – Føroyskt varð nevniliga mett sum 2. floksmál. Nú virkar tað meira sum eitt púra ørt argument, men ongar lærubøkur vóru á føroyskum tá, og fá høvdu møguleika at fara á skúla, greiðir Anja Andreassen frá.

– Okkum nýtist ikki at skilja argumentini hjá teimum tá, men kunnu konstatera, sigur Anja Andreassen um munin millum tíðina fyri 100 árum síðani og í dag, og sipar m.a. til støðu floksins í málspurninginum.